# Einsamallur hani í eini konufólkaverð

Tann 21 ára gamli klaksvíkingurin, Jógvan Hansen, sum tey flestu kenna frá tónleikabólkinum Aria, er einsamllur hani í eini konufólkaverð. Hann er í frisørlæru, og í løtuni gongur hann í skúla, har hann er einsamallur hani saman við ellivu konufólkum



**TERJI NIELSEN**

Klokkan er farin av



átta hetta kvøldið, tá ið Yngd kemur á gólvið á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Í einum króki beint innan fyri høvuðsinngongdina sita nøkur ungfólk og práta. Ein av teimum er 21 ára gamli klaksvíkingurin Jógvan Hansen, og tað er hann, ið vit skulu hava eitt prát við.

**Hevur bert lært í hálvt ár**

Jógvan er kendur frá tónleikabólkinum Aria, men tað er ikki fyrst og fremst hetta, ið vit ætla at fáa okkum eitt prát um. Fyri góðum hálvum ári síðani fór Jógvan at læra til frisør hjá Salong Sólrun í Klaksvík. Vit spyrja Jógvan, hvussu tað bar til, at hann fór í frisørlæru.

Til hetta svarar Jógvan, at hann hevði roynt nógv ymsikt seinastu árini. Hann hevði arbeitt í fiski og í timburhandli, og somuleiðis hevur hann verið í Danmark á rútmiskum háskúla, men í veruleikanum byrjar søgan um Jógvan og frisøryrki fyri nógvum árum síðani. Síðani hann var heilt lítil, er Jógvan blivin kliptur hjá Salong Sólrun, og fyri nógvum árum síðani segði Jógvan við Sólrun, at tá ið hann bleiv stórur, fór hann at biðja Sólrun læra seg at klippa.

Einaferð seinasta summar kom Sólrun so á dyr heima hjá Jógvani og teimum, og hon spurdi Jógvan, um hann ikki hevði at koma og læra til frisør hjá sær. Hetta hugsaði Jógvan so um í eina tíð, áðrenn hann tók av, og tann 10. August 1999 byrjaði hann at læra hjá Salong Sólrun. Sjálvur sigur Jógvan, at hetta hevur ikki angrað eina tí einastu ferð.

**Fordómarnir eru nógvir**

Tað er eingin loyna, at tað fyrst og fremst eru konufólk, ið starvast innan fyri frisøryrki. Mannligu frisørarnir í Føroyum kunnu teljast á einari hond, so tað er ein konufólkaverð, ið Jógvan nú dagligani ferðast í. At tey fáu mannfólki, ið eru ella læra til frisør, eisini fáa nógv oman yvir seg, man heldur ikki koma óvart á tey flestu, og Jógvan hevur eisini fingið nakrar viðmerkingar.

Serliga er tað innan tað eldra ættarliðið, at fordómarnir fyri mannligum frisørum eru nógvir, og Jógvan sigur eisini, at tá ið hann segði fyri familjuni, at hann fór at læra til frisør, fekk hann dyggan, hóast abbin hevði eitt sindur ilt við at skilja, at abbasonurin skuldi fara í frisørlæru.

Hóast Jógvan hevur fingið fleiri keðiligar viðmerkingar, so er tað eingin loyna, at yngra ættarliðið skilur, at markið fyri, hvat ið er ein konufólkaverð, og hvat ið er ein mannfólkaverð á arbeiðsmarknaðinum, er vorðið alsamt meiri flótandi seinnu árini, so at vit í dag ikki longur kunnu siga, at hatta er eitt konufólkaarbeiði, meðan hitt er eitt mannfólkaarbeiði. Javnstøðan er komin fyri at verða, og hon virkar báðar vegir!

Um so er, at onkur fær ilt í r_ina av, at Jógvan lærir til frisør, leggur hann sjálvur einki í, tí fyri hann er tað líkamikið, hvat onnur halda um hann!



**Trívist væl millum øll konufólkini**

Spurdur, hvussu tað var at vera einsamallur hani millum ellivu hønur á frisørskúlanum, sigur Jógvan, at tað er bara heilt gott, og at hann trívist væl. Frá sínum dagliga arbeiði í salongini í Klaksvík er hann vanur við at arbeiða saman við konufólki burturav, og tað dámar honum bara væl.

At tað tó onkuntíð kann gerast eitt sindur ov roksut, leggur Jógvan heldur einki í, men tá ið damurnar fara at tosa um mánasjúkuna og slíkt, tá heldur Jógvan seg vekk! Jógvan leggur tó aftrat, at tað eru summir vansar við at vera mannfólk á einum frisørskúla. Til dømis nevnir hann, at tá ið tey læra at gera manicure, tað vil siga neglarøkt, so læra tey tað við at gera tað hjá hvørjum øðrum, men har er ikki nógv at gera við Jógvansa negl, tí tær eru niðurbitnar og slitnar. Eisini nevnir klaksvíkingurin sminkuna, tí tað er ikki so lætt at læra seg at leggja make-up, tá ið modellin er mannfólk! Síðani Jógvan byrjaði á Frisørdeildini hjá Teknsiska Skúla í Havn fyrst í januar mánaða, hevur hann búð á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Har trívist hann eisini væl, og sum hann sjálvur sigur, at um man keðir seg í frítíðini, meðan man gongur í skúla í Havn, so hevur man sjálvur skyldina í tí. Hann nevnir í hesum sambandi, at millum teir mongu næmingarnar, ið búgva á Skúlaheiminum, er samanhaldið sera gott, og um kvøldarnar hevur tú møguleika fyri at spæla borðtennis, billard, venja vektir ella hyggja í sjónvarp á heiminum, so ongin skuldi havt nakra orsøk til at kett seg.

**Hvussu er so við Aria?**

Tey eru óivað mong, sum kundu tonkt sær at vita, hvussu tað gongst við Aria, og um ein nýggj fløga er á veg. Hendan spurningin settu vit eisini Jógvani, nú vit hittu hann á máli. Somuleiðis spurdu vit hann, hvussu tað gekk við at fáa tónleikin og frisøryrkið at hanga saman.



Jógvan segði, at tað var ikki tað stóra virksemi í Aria í løtuni, tí gittarleikarin er í Danmark. Hóast hetta hevur bólkurin spælt nakrar ferðir til dans, og tá hava teir lænt aðrar gittarleikarar, eitt nú Ólavur Øster.

Sum tað eisini er nevnt í Sosialinum fyrr, so hevur sølan av fløguni hjá Aria, After These Messages, gingið stak væl, og Jógvan sigur, at higartil er eini 1300 eintøk seld av fløguni, sum er blivin endurprentað.

Viðvíkjandi eini nýggjari fløguútgávu, so hevur Aria, eins og tónleikabólkar flest, ovmikið av tilfari liggjandi á goymslu. Tað er tó greitt, at skal ein fløga spælast inn, so krevur hetta, at limirnir í bólkinum skræða sær nakrar mánaðir úr álmanakkanum, og hetta er eitt sindur trupult, um tú til dømis stendur í læru ella gongur í skúla, sum tað er galdandi fyri fleiri av limunum í Aria. Tó heldur Jógvan, at hann hevur so mikið fittan lærumeistara, at tað hevði allarhelst borið til hjá honum at fingið eina tíð frí, so at teir kundu farið í upptøkuhølini.

Sjálvandi kundi Jógvan gott hugsað sær at livað av tónleiki, men hetta er nærum ógjørligt í Føroyum, heldur hann, men leggur tó aftrat, at tað ber kanska til, um man vil liva á hungursmarkinum. Hann hevði hug til at læra til frisør, og tað hevur ikki angrað eina tí einastu ferð, og tað vónar Jógvan heldur ikki, at hann nakrantíð fer at gera. Hvat hini so halda, ja tað leggur 21 ára gamli klaksvíkingurin einki í!